Álit

í

løgtingsmáli nr. 53/2022: Uppskot til løgtingslóg um grundvatn

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum, hevur lagt málið fram tann 7. mars 2023 og eftir 1. viðgerð tann 23. mars 2023 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 31. mars, 19., 21. og 26. apríl og 4. mai 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Kommunufelagið, Óðalsfelagið, Bóndafelag Føroya, SEV, Jarðfeingi og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Erhard Joensen, Eyðdis Hartmann Niclasen, Jørgen Niclasen og Árni Skaale) hevur hesar viðmerkingar:

Meirilutin er ikki ósamdur í, at vit eiga at skipa viðurskiftini við grundvatni í lóg.

Seinastu árini eru staðfestar munandi nøgdir av sokallaðum grundvatni í undirgrundini.
Tað byrjaði við boringini av Sumbiarbergholinum, at man í 1988 kom fram á leyst og rivut fjall, har stórar nøgdir av vatni lóku úr fjallinum. Síðan hevur man við boringum eisini staðfest stórar nøgdir av grundvatni aðrastaðni í landinum.

Tað sum serliga ørkymlar meirilutan er, at í grein 5 í lógaruppskotinum verður vatn, ið rennur upp til yvirflatuna, also kelduvatn, umfatað av lógini, also sum grundvatn. Hetta er nýggj definitión, sum meirilutin metir hava avgerandi týdning fyri grundleggjandi viðurskifti.
Serliga er tað ivin um, hvørt henda lóg ger seg inn á ognar- og ræðisrættin hjá jarðareigarum til vatn, sum rennur inni á teirra matrikli.
Í "Lov for Færøerne om benyttelse af Indsøer og Vandløb" frá 1937 er ásett, at jarðareigarin hevur ræðisrætt á tí vatni, sum er í vøtnum, áum ella løkjum sum eru innanvert matrikkulin, um ikki serlig rættarviðurskifti, lóg ella "sædvane" forðar fyri tí.

Í nevndarviðgerðini bleiv spurt beinleiðis um, nær vatnið, sum spríkir úr keldum, fer frá at vera grundvatn, til at vera omanávatn, tó uttan at fáa eitt klárt svar.
Harafturat undrast meirilutin stórliga á, at m.a tey, sum varða av óðals- og festijørðini, ikki eru hoyrd í tilgongdini til lógaruppskotið. Tað kundi havt ruddað ivamál, sum nevndin situr við, av vegnum.

Eisini eru loyvini, sum SEV í dag hevur í sambandi við gagnnýtslu av vatni til orkuframleiðslu, givin sambært lógini om Benyttelse af Indsøer og Vandløb frá 1937. Tað hevur verið ivi sáddur um, eftir hvørjari lóg SEV frameftir fer at verða viðgjørt. Upplýst er fyri nevndini, at tað hevði verið ynskiligt, at viðgerðin fer fram eftir einari lóg og ikki í tveimum lógum.

Meirilutin mælir tí landsstýrismanninum til at evna uppskotið av nýggjum, har øll løgfrøðilig ivamál eru beind av vegnum, og at uppskotið verður sent til hoyringar hjá øllum viðkomandi pørtum.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Annika Olsen, Uni Holm Johannesen og Karlot Hergeirsson) hevur hesar viðmerkingar:

Hetta uppskotið hevur til endamáls at staðfesta, at grundvatn er ráevni í undirgrundini og tí fólksins ogn. Grundvatn er ikki skipað í lóggávu, og tað er breið politisk semja um, at vit eiga at hava greiðari reglur fyri, hvussu og við hvørjum treytum loyvi kann veitast at gagnnýta grundvatn. Við hesum uppskotinum verða reglur ásettar fyri, hvør kann gagnnýta grundvatn, hvussu loyvi verða veitt, loyvistreytir, loyvistíðarskeið og reglur um at taka loyvi aftur.

Undir nevndarviðgerðini er spurningurin reistur, nær vatn er at meta sum grundvatn ella omanávatn. Grundvatn er vatn, sum annaðhvørt spríkir upp av sær sjálvum sum kelda, ella sum kemur fram í sambandi við boringar, t.d. í sambandi við jarðhita, tunlar o.tíl. Tá vatnið er komið upp úr undirgrundini, verður tað til omanávatn. Tað sæst í viðmerkingunum til uppskotið, at lógin bara fevnir um grundvatn, men til tess at gera greitt, at omanávatn ikki er fevnt av løgtingslógini verður sett fram eitt broytingaruppskot fyri at gera tað meira greitt, hvat er at skilja sum omanávatn.

Uppskotið til løgtingslóg um grundvatn ger seg ikki inn á rættindi hjá grundeigara. Lov for Færøerne om Benyttelse af Insøer og Vandløb frá 1937 vissar grundeigara brúksrætt til tað vatn, sum er í vøtnum, áum og smærri løkum, um annað ikki er galdandi eftir rættarviðurskiftum, lóg ella siðvenju. Í hesum førum er talan um omanávatn, og sambært viðmerkingunum til lógina frá 1937 er talan um ein brúksrætt til omanávatn, og ikki ognarrætt. Har stendur:
“Man har med Flid undgået at bruge Ordet “Ejendomret” til Vand, idet man har villet undgaa forskellig Tvivl, der derved kunde opstaa, og har ment, at man ved at bruge Ordet Raadighed netop rammer, hvad det i en Lov om Vands benyttelse kommer an paa, nemlig Adgangen til at gøre sig Vandet tjenligt.”

Tá grundvatn av sær sjálvum rennur upp á eini ogn, hevur grundeigarin rætt til at brúka vatnið, men má grundeigari uttan endurgjald fyri avmarkingar í brúksrættinum tola, at vatnið verður brúkt til annað endamál.

Eitt annað ivamál hevur verið, hvør hevur endurgjaldsábyrgd, um skaði stendst av grundvatni, sum rennur upp. Rennur grundvatn upp í sambandi við boringar, eigur tann, sum ger installatiónina, endurgjaldsábyrgd fyri skaða á annan mans ogn eftir vanligum endurgjaldsreglum.

Rennur grundvatn upp av sær sjálvum, og skaði stendst av hesum, er tað landið sum eigari, sum hevur ábyrgdina uttan so, at slík hending verður mett ájavnt við force majeure. Jarðfrøðingar meta hesa støðuna vera sera hypotetiska, men avvísa ikki, at verandi grundvatnsstøða kann skeiklast, um inntrivini verða ov mong.

Minnilutin heldur tað vera gott at fáa greiðari karmar um grundvatn, tí stórir møguleikar eru í grundvatni í føroysku undirgrundini. Vatngoymslurnar eru stórar, og tað er tilfeingi, sum kann gagnnýtast til millum annað drekkivatn, upphiting, el-framleiðslu ella vinnuliga framleiðslu. Dømi um grundvatn, sum verður gagnnýtt nú, er vatnið í Sumbiartunlinum, sum verður brúkt bæði sum drekkivatn og til vinnuliga framleiðslu. Tórshavnar kommuna hevur somuleiðis ætlanir um at gagnnýta grundvatnið á Lygnnesi í Kollafirði til at hita kommunalar bygningar.

Vitanin um grundvatnið í Føroyum er framvegis avmarkað, og tað er av somu orsøk umráðandi at fyrisita hetta tilfeingið eftir fyrivarnisreglu, so grundvatnið ikki verður dálkað ella annað av vantandi vitan.

Minnilutin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 2, verður sum stk. 2 sett:
"*Stk. 2*. Omanávatn, t.e. vatn, sum rennur í áum, vøtnum o.tíl., er ikki fevnt av løgtingslógini."

Serligar viðmerkingar
Til tess at gera greitt, at omanávatn ikki er fevnt av løgtingslógini verður skotið upp at áseta, at omanávatn er vatn, sum rennur í áum, vøtnum o.tíl.

Við hesum viðmerkingum og broyting tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 12. mai 2023

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstformaður	Uni Holm Johannesen
Karlot Hergeirsson	Árni Skaale	Jørgen Niclasen

Eyðdis Hartmann Niclasen